# UPSI

***Pollachius virens***



**Serføroyskur stovnur**
**Gagnfiskur**
**Botnfiskur**
**Elsti aldursgreinaði upsi undir Føroyum: 22 ár**
**Longsti mátaði upsi undir Føroyum: 134 cm**

## Lívfrøði

Upsi verður vanliga roknaður sum botnfiskur og verður eisini fyrst og fremst fiskaður við botntroli, men hann ferðast eisini nógv uppi í sjónum.

### Útbreiðsla

Upsi er vanligur undir Føroyum, bæði inni við land og til havs og finst út á umleið 450 m dýpi á Landgrunninum, á Føroyabanka, ytru bankunum og á Íslandsrygginum. Hann er annars við Svalbard og Novaja Semlja, suður í Norðsjógvin og Skagerrak, kring Bretsku Oyggjarnar, og í Biskeiavíkini. Vestaru megin Atlantshavið er upsi undir Eystur- og Vesturgrønlandi, við Labrador til North Carolina (Mynd 1).



*Mynd 1. Útbreiðsla av upsa.*

### Vøkstur

Miðal vøkstur í tíðarskeiðnum 2009-2013 er vístur á Mynd 2. Vøksturin hjá upsa, serliga ungum fiski, tykist at vera tengdur at tættleika. Tað vil siga, at tess meiri er til av upsa, tess smærri eru einstøku upsarnir. Tískil er Mynd 2 ein løtumynd, sum kann broytast nógv frá einum tíðarskeiði til annað. Aftaná kynsbúningina fer upsin at vaksa seinni.

Aldurin hjá upsa verður staðfestur við at telja árringar í nytrunum. Nytran á upsa er lutfalsliga stór (Mynd 3), og tí verður hon skorin, áðrenn hon verður lisin, fyri at síggja aldursringarnar betri.




*Mynd 2. Miðallongd móti aldri, mátað á yvirlitstroling-unum um várið á Landgrunninum 2009-2013. Við gráum strikum er víst, nær helvtin av upsanum er búgvin at gýta fyrstu ferð.*



*Mynd 3. Upsanytrur.*




*Mynd 4. Longd móti vekt mátað frá landingum, árini 2009-2013.*

Longd móti vekt fyri allar støddir av landaðum upsa sæst í Mynd 4. Miðalvektin á 60 cm longum upsa var umleið 1.8 kg árini 2009-2013.

Vøksturin hjá upsa, serliga hjá ungum fiski, tykist at vera tengdur at tættleika. Tað vil siga, at tess meiri er til av upsa, tess smærri eru einstøku upsarnir – hetta er betri lýst í brotinum um veiðu, har miðalvektirnar síðstu trýss árini verða lýstar.

## Kynsbúning

Í miðal gýtir helvtin av upsanum fyrstu ferð umleið 5 ára gamal; tá er hann um 60 cm til longdar (Mynd 2). Átta ára gamlir hava næstan allir gýtt minst eina ferð. Um upsin er kynsbúgvin ella ei, verður kannað við at hyggja at kynsgøgnunum. Í tí sambandi verður skrásett, hvussu langt í búningini hann er komin. Ein óbúgvin upsi hevur búningarstig 1 og ein búgvin upsi búningarstig 2-7, alt eftir hvar í ringrásini hann er.

## Gýting

Gýtingin fer fram í tíðarskeiðnum januar-apríl, tó er høvuðsgýtingin í februar-mars. Megingýtingarøkið er á 150-250 m dýpi eystan fyri Føroyar (Mynd 5), men gýtandi upsi verður eisini fingin aðrastaðni á Landgrunninum.



*Mynd 5. Høvuðsgýtingarøkini hjá upsa á Landgrunni-num.*

## Yngul og ungfiskur

Rognkorn og larvur reka við streyminum runt Føroyar til umleið juni-juli, tá yngulin (Mynd 6), um 2,5-3,5 cm langur, leitar sær inn undir land.

Fyrsta árið livir upsin sum murtur heilt inni við land og er um heystið um 10-13 cm til longdar. Sum hann eldist, leitar hann sær út á firðirnar og longri út at leita sær føði, og umleið trý ára gamal, tá hann er 45-50 cm til longdar, fer hann longri útfrá og djypri og kemur tá inn í vinnuliga fiskiskapin.



*Mynd 6. Upsayngul fingin við Magnusi Heinasyni á yngultúri síðst í juni, har trolað varð uppi í sjónum.*

## Ferðing

Upsastovnurin undir Føroyum verður roknaður sum ein sjálvstøguður stovnur, men hevur tó eitt ávíst samband við aðrar upsastovnar í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum, t.e. í Barentshavinum, undir Íslandi, vestan fyri Skotland og í Norðsjónum. Ungi upsin heldur seg nær landi, men tá hann verður um 60 cm ella um 5 ára aldur leitar hann sær javnan í onnur sjóøki. Hetta er kannað við merkiroyndum í trimum umførum – seinastu ferð í 1991. Fjórði hvør upsi, sum varð merktur undir Føroyum, varð afturfingin undir Íslandi, tá hann var longri enn 60 cm. Hinvegin vísa merkiroyndir í Íslandi, at ferðingin úr Íslandi er sera avmarkað. Bert 1% av teirra vaksna fiski var afturfingin undir Føroyum. Nakað av ferðing er eisini ávíst úr norskum øki til Føroya og úr Føroyum til Norðsjógvin og norskt øki.

## Føði

Føðin hjá upsayngli er æti, seiðamurturin etur smá krabbadjór, seiðurin etur krabbadjór og smáan fisk, t.d. nebbasild og viðhvørt nýggja seiðayngulin. Vaksni upsin etur smáan fisk, t.d. hvítingsbróðir og svartkjaft og eisini krill (Mynd 7). Føðin hjá upsa speglar væl, at hetta er ein fiskur, sum ferðast nógv uppi í sjónum, tí hann etur so at siga ongi botndjór.




*Mynd 7. Føðin í vekt í upsamagum býtt í høvuðsbólkar um várið og um summarið árini 2009-2013.*

## Veiða

Veiðutøl fyri upsa undir Føroyum eru tøk síðani 1903 (Mynd 8). Fyrstu mongu árini fiskaðu aðrar tjóðir, serliga bretar og seinni eisini fraklendingar, so at siga allan upsan. Fyrst í 1960-unum vaks føroyski parturin av upsaveiðuni munandi, og eftir at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar í 1977, hava føroyingar fiskað at kalla allan upsan undir Føroyum. Síðstu 20 árini hevur útlendski parturin av føroysku upsaveiðuni í miðal verið 2 %.




*Mynd 8. Heildarveiðan av upsa á Landgrunninum 1905-2017 í rundari vekt.*




*Mynd 9. Lutfalsliga aldursbýtið í upsaveiðuni á Landgrunninum í 2017.*

Upsaveiðan undir Føroyum hevur sveiggjað nógv síðani stovnsmetingarnar byrjaðu í 1961. Í 1995 var heildarveiðan umleið 20 túsund tons, men tá hon var upp á tað hægsta, í 2007, var hon nærum 70 túsund tons (Mynd 8). Seinastu seks árini hevur veiðan tó verið minni enn miðal fyri tíðarskeiðið, síðani stovnsmetingarnar byrjaðu tó er honn økt spakuliga síðani 2014.

Aldursbýtið í upsaveiðuni á Landgrunninum í 2017 er víst á Mynd 9. Hon vísir, at meginparturin av upsanum var 4 og 5 ára gamal.

Miðalvektin fyri upsa á Landgrunninum er broytt nógv gjøgnum árini. Hvussu nógv 4 til 7 ára gamal upsi í miðal hevur vigað síðani 1961 er víst í Mynd 10. Miðalvektin á upsa broytist við stovnsstøddini. Tá nógv er til av upsa verða einstøku upsarnir smærri; hetta er serliga týðuligt fyri ungan upsa, tá hann heilt er komin




*Mynd 10. Miðalvekt á 4-7 ára gomlum upsa á Landgrunninum 1961-2017.*

inn í fiskiskapin 5-6 ára gamal. Sum hann eldist fánar hetta mynstrið nakað. Miðalvektin var høg í 1960-unum, fyrru helvt av 1980-unum og mitt í 1990-unum (Mynd 10). Seint í 1990-unum komu tveir heilt stórir árgangir inn í upsastovnin, og tá minkaði miðalstøddin rættuliga nógv. Henda minking helt á til umleið 2009, men hesi síðstu árini eru miðalstøddirnar aftur vaksandi, tó at tær enn eru lægri enn miðal fyri alt tíðarskeiðið.

Á landingarmiðstøðunum kring landið verður upsin bólkaður í 5 støddarbólkar, alt eftir vekt. Áleið hvussu gamal og hvussu langur upsin er í mun til vektbólkarnar 1 til 5 er víst í Talvu 1. Eisini er víst á leið hvussu stórur partur av upsanum er kynsbúgvin í ymsu støddarbólkunum.

*Talva 1. Umrokningartalva út frá støddarbólkum. Virðini byggja á tøl fyri árini 2009-2013. Aftasta kolonnan sigur, hvussu stórur partur av fiskinum í ymsu støddarbólkunum væntandi hevur gýtt minst einaferð.*

| | Kruvd vekt (kg) | Aldur (ár) | Longd (cm) | % Búgvin |
|---|---|---|---|---|
| Stødd 1 | 5,0+ | 9-13+ | 85-98+ | 98-100% |
| Stødd 2 | 3,0-5,0 | 6-11 | 73-85 | 73-100% |
| Stødd 3 | 1,5-3,0 | 4-8 | 58-72 | 28-96% |
| Stødd 4 | 1,2-1,5 | 3-6 | 52-58 | 5-52% |
| Stødd 5 | 0,7-1,2 | 3-5 | 45-53 | 5-52% |
| Stødd 6 | <0,7 | 2-4 | 38-45 | 0-28% |

## Stovnsmeting

Umframt upplýsingarnar um veiðuna í tali eru stovnsmetingarnar av upsastovninum grundaðar á hagtøl viðvíkjandi veiðu og royndum fyri ymiskar skipabólkar hvør sær og á vár- og summaryvirlitstrolingarnar við Magnusi Heinasyni. Tilfar er tøkt at gera stovnsmetingar av upsastovninum aftur til 1961.

Í hvørjari stovnsmeting verður m.a. fiskideyðatalið, gýtingarstovnurin, og tilgongdin roknað út fyri hvørt ár. Stovnsmetingar frá einum ári til annað geva ikki sama úrslit. Sum heild er lítil og eingin broyting í úrslitunum fyri árgangir, sum hava verið gjøgnum fiskiskapin og eru uppfiskaðir/deyðir. Úrslitini fyri árgangir, sum hava verið stutta tíð í fiskiskapinum kunnu broytast nógv frá einum ári til annað, júst tí at ein hevur fleiri tøl at halda seg til. Serliga úrslitini frá seinastu árunum kunnu broytast nógv.

Tilgongdin av upsa undir Føroyum (tal av 3 ára gomlum upsa) er víst á Mynd 11. Tilgongdin hevur síðani 1961 skift frá lítlari til stóra tilgongd í trimum umførum. Tilgongdin var søguliga góð frá 2001 til 2003. Síðani hevur hon ligið ímillum at vera heilt góð og yvir miðal fyri stovnsmetingartíðarskeiðið.




*Mynd 11. Tilgongdin til upsastovnin 1961-2017 gjørd upp fyri hvønn árgang sum tal á 3 ára gomlum fiski.*

Støddin á gýtingarstovninum síðani 1961 er víst á Mynd 12. Gýtingarstovnurin var størstur í 1970-unum (væl oman fyri 100 túsund tons) men minkaði síðani til 1996, tá hann var mettur til 24 túsund tons. Við stóru árgangunum, sum tá komu inn í upsastovnin, vaks gýtingarstovnurin aftur til 2005. Gýtingarstovnurin er minkaður niður í helvt síðani 2005. í 2012-2013 var hann tað minsta síðani stovnsmetingarnar byrjaðu í 1961, men er kvinkaður nakað upp síðani 2015.

Miðal veiðutrýst fyri aldursbólkarnar 4 til 8 ár aftur til 1961 er víst í Mynd 13. Í 1980-unum fóru vit frá at fiska umleið 16% úr stovninum um árið, til at fiska út við 46% úr stovninum um árið. Síðan minkaði veiðutrýstið so við og við til 1998, men er seinnu árini vaksið aftur.




*Mynd 12. Gýtingarstovnurin hjá upsa við ársbyrjan 1961-2017.*




*Mynd 13. Veiðutrýstið á upsastovnin 1961-2017 roknað sum miðal fyri aldrarnar 4 til 8 ár. Vinstrumegin víst sum virðið F og høgrumegin sum % fiskað úr stovninum.*

Í tíðarskeiðnum 2010-2015 var fiskað umleið 35% av stovninum um árið. Veiðutrýstið er minkað síðani 2015.

### Forsagnir

Tilgongdin hevur verið beint oman fyri miðal seinastu árini (Mynd 11). Veiðutrýstið í 2017 verður mett at vera tað lægsta síðani 2004. Um sama veiðutrýst heldur fram, væntast at gýtingarstovnurin fer at vaksa munandi komandi árið.

### Keldur

ICES, 2018. NWWG 2018.

í Homrum, E. 2012. The Effects of Climate and Ocean Currents on Faroe Saithe. PhD-ritgerð.

Jákupsstovu, S. H. í, 2004. Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár. Úrdráttir úr hagtølum frá ICES.

Mouritsen, R. 2007. Fiskur undir Føroyum.

Ábyrgdarfrøðingar: Eydna í Homrum (lívfrøði) og Luis R. Cruz (stovnsmeting)